***Tíðargreinin** verður skrivað av skiftandi fólkum, sum ikki dagliga eru knýtt at blaðnum. Evnini eru ymisk, men viðgera øll okkurt evni, sum er viðkomandi fyri tíðina júst nú.*

Sjúrður Skaale
fólkatingsmaður

Huawei: Føroya Tele er Føroya Landsstýri

Avgerðin um 5G-netið snýr seg um álit. Líta vit meira á Huawei ella Ericsson? Kina ella Svøríki? Nú hevur Mette Frederiksen endiliga meldað út - men Føroya Tele eigur avgerðina

Sjúrður Skaale

Føroya Tele skuldi langt síðani havt gjørt av, hvør veitari skal seta upp 5G-netið í Føroyum. Men tá tað kom amerikansku sendistovuni fyri oyra, at tað kundi gerast Huawei, byrjaði eitt stríð millum USA og Kina, har Føroyar vóru miðdepilin. Hetta gjørdi, at avgerðin bleiv útsett - og ikki er tikin enn.

Sendikvinnan hjá USA í Danmark fór alment út fleiri ferðir og ávaraði í bombastiskum vendingum Føroyar móti at velja kinesiska veitaran, og kinesiski sendimaðurin kom til Føroya á ein fund, sum orsakað av eini tendraðari mikrofon gjørdist heimskendur.

Tað er ikki ofta, at Føroyar gerast miðdepil í einum politiskum stríði millum stórveldini.

Tað heilt serstaka var kortini, at landsstýrið onga meining hevði um málið.

Sambært USA er avgerðin um, hvør televeitari skal veljast, trygdarpolitikkur á hægsta stigi. Eisini í øðrum londum er politisk støða tikin til spurningin. Men sambært landsstýrinum er ikki talan um eitt politiskt mál yvirhøvur.

Danska stjórnin, sum hevur evstu ábyrgd av ríkisins trygdarpolitikki, hevur higartil eisini noktað so mikið sum at hava eina meining um málið.

Hetta hevur rætt og slætt verið udanstøkking, og eg havi sum fólkatingsmaður fleiri ferðir kritiserað tað. Eisini alment í danskari pressu.

Sannleikin er, at stjórnin hevur tikið atlitið til danska handilin við Kina fram um sína trygdarpolitisku ábyrgd. Hvør orsøkin til landsstýrisins passivitet er, kann ein bara gita um. Men boðini til Føroya Tele frá bæði donskum og føroyskum myndugleikum hava verið, at avgerðin um 5G-netið eina og aleina skuldi byggja á vinnulig atlit.

Inntil seint í gjárkvøldið. Tá gjørdi forsætisráðharrin endiliga greitt, at 5G er partur av trygdarpolitikkinum, og at ein lóg er á veg, sum skal tryggja, at veitarar av 5G eru álítandi, og ikki arbeiða ímóti ríkisins áhugamálum.

Adressan er púra greið: Huawei. Og av tí at lógin snýr seg um trygdarpolitikk, fer hon at fevna um alt ríkið.

Polar Silk Road

Tað átti ikki at tikið so langa tíð at koma fram til hesa niðurstøðuna. Ein og hvør, sum bara hevur fylgt eitt lítið sindur við farnu árini, veit, at telesamskifti ikki bara snýr seg um forrætning.

Hóast lógin ikki er sett í gildi enn, og vit tí formliga framvegis kunnu velja Huawei, eiga vit at fylgja endamálinum við lógini.

Í fjør kom út bókin Permanent Record eftir Edward Snowden. Hon vísir, hvussu amerikanska fregnartænastan savnaði heilt ófatiliga nógvar upplýsingar um fólk - júst tí hon hevði atgongd til teirra telesamskifti. Og tað er púra logiskt, at tann, sum veit so nógv um hvønn einstakan borgara, fær eitt øgiligt vald.

Huawei noktar kategoriskt at felagið fer at lata upplýsingar um teirra kundar til kinesisku stjórnina. Tað letur seg heldur ikki gera tekniskt, verður sagt.

Vit vita kortini, at tað eru tøtt bond millum Huawei og leiðsluna í Beijing, og fyritøkan hevur eisini fingið veldugar upphæddir í óbeinleiðis stuðli frá kinesisku stjórnini. Hetta er m.a. gjørt við serstøkum skattatreytum fyri Huawei.

Vit vita, at tað, sum ikki ber til tekniskt í dag, kann bera til í morgin.

Vit vita, at velja vit Huawei, so verða vit, so ella so, tættari knýtt at Kina - hóast eingin njósning verður.

Vit vita, at Kina er eitt land, sum als ikki virðir mannarættindini - og samstundis eitt land, sum vil hava fótin fastan í okkara parti av heiminum. Fyri tveimum árum síðani varð stóra strategiin The Polar Silk Road fráboðað. Endamálið er, at Kina skal vera við til at menna arktiska økið, og knýta londini í norðurhøvum at sær.

Tí er hetta ikki bara ein spurningur um forrætning.

Vit mugu spyrja okkum sjálv, um vit vilja verða tættari knýtt at Kina. Vit mugu spyrja, hvat fyri avleiðingar tað fær í framtíðini, tá trygdarpolitiski týdningurin av okkara øki fer at økjast, um vit nýta Huawei. Vit mugu spyrja hvat fyri avleiðingar tað fær fyri okkara samstarv við USA og okkara grannalond. Vit mugu spyrja, hvussu tað fer at ávirka møguleikarnar hjá Føroya Tele at veita tænastur til skip og oljupallar.

Gott alternativ

Skrivingin hjá amerikanska sendiharranum hevur fingið nógv at halda, at hetta er eitt val millum USA og Kina. Og so verður vístá, at USA sanniliga eisini njósnast - sum avdúkingarnar hjá Snowden so væl vísa.

Men valið stendur ikki millum hesi bæði stórveldi. USA er als ikki við í kappingini um 5G - men vit eru so heppin, at vit hava eitt kappingarført, norðurlendskt alternativ. Svenska fyritøkan Ericsson bjóðar eisini fram 5G-net, og hevur longu gjørt einar 80 avtalur um at seta upp slíkan útbúnað.

Orsøkin er ikki bara, at hon er kappingarfør í kvaliteti og prísi. Orsøkin er eisini, at mong lond ikki vilja knýta seg ov tætt at Kina við teirri óvissu, sum fylgir við tí. Í staðin vilja londini tryggja sær, at tey eisini í framtíðini hava tamarhald á hesum púra avgerandi øki.

Hetta var millum orsøkirnar til, at norðurlendski íløgubankin, sum norðurlendsku stjórnirnar eiga, í fjør gav Ericsson eitt milliardalán til gransking og menning.

Ericsson er ein av trimum fyritøkum, sum Føroya Tele hevur tingast við. Og nú kann ikki ganga long tíð, til avgerðin skal takast.

Vónandi er Ericsson - sum manga aðrastaðni - best og bíligast.

Men um ikki, so má mann vóna, at leiðsla og nevnd á Føroya Tele seta teir spurningar, sum eg nevni omanfyri. Teir eru politiskir, og fella sostatt uttan fyri tað, sum hesi fólk eru sett at svara uppá.

Men landsstýrið, hvørs uppgáva er at taka støðu til hetta, hevur higartil noktað at gera tað.

Nú hevur danska stjórnin boðað frá, at málið verður tikið í trygdarpolitiskum álvara, og at ein lóg er á veg. Men hon verður neyvan samtykt áðrenn Føroya Tele hevur tikið sína avgerð.

Tí liggur bólturin í Klingruni í Hoyvík. Føroya Tele er endað sum Føroya Landsstýri í hesum týðandi máli.

Vónandi kenna tey sína ábyrgd, og taka onnur atlit enn bara stuttskygda forrætning.

Løgmaður segði við Sosialin 2. desember í fjør, at landsstýrið ikki blandar seg í, hvønn veitara Føroya Tele velur sær

Stór áhugamál hava verið frammi í kjakinum, hvønn veitara Føroya Tele skal velja sær